## Fidel komin fyri seg

Fyrrverandi kubanski forsetin Fidel Castro var aftur at síggja á skíggjanum hjá kubanska sjónvarpinum í gjár, og tað var fyrstu ferð í 14 mánaðir. Tað var líkt til, at hann hevur tað betur nú enn á myndum, sum hava verið almannakunngjørdar tey seinastu árini. Í sendingini í gjár var tann 83 ára gamli Fidel í kjaki við nakrar studentar úr Venesuela um ymsar altjóða spurningar. Politiskir eygleiðarar siga við BBC, at hóast Fidel noyddist at lata brótðurinum Raúl forsetasessin, hevur hann framvegis stóra ávirkan á landsins stjórn og ta politisku kósina.



## Merkel vil hava svar

Týski samveldiskanslarin, Angela Merkel, vil nú hava at vita frá amerikonsku bilaverksmiðjuni General Motors, hvør sleppur at keypa tað týska bilmerkið Opel, sum GM hevur lýst til sølu. Kanslarin segði í gjár, at hon harmast um, at tað skal taka so drúgva tíð at taka eina avgerð, men hon vónaði at fáa endalig boð frá GM í hesi vikuni. General Motors hevur fingið eitt tilboð upp á Opel frá fyritøkuni Magna, sum eysturríkarar og kanadiumenn eiga, og Angela Merkel vil hava amerikanararnar at taka av hesum tilboðnum, skrivar DPA. Umleið 25.000 fólk arbeiða hjá Opel í Týsklandi.

# Settu lívið í váða um Atlantshavið

**Amerikansku brøðurnir Robert og Ralph Brown komu sunnumorgunin til Føroya í einum lítlum opnum flatbátaðum botni. Endamálið er at koma í metbókina hjá Guinnes og at heiðra teir, sum fyri 29 árum síðan fullu í miseydnaða átakinum hjá Jimmy Carter á amerikansku sendistovuni í Teheran í Iran**



*Nógv fólk hava veri niðri og hugt at bátinum, og nøkrum teirra er eydnast at fáa eitt prát. Ørskapur, siga føroyingar*

**VÁÐAVERK**
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Leygarmorgunin kom ein lítil bátur inn í bátahylin á Argjum. Útlúgvaðir grulvaðu teir upp á land og mestsum sovnaðu. Menninir vóru teir báðir amerikansku brøðurnir Robert og Ralph Brown, báðir hava teir rundað tey fimti.

Í 1980 skuldi Ralhp vera við í innrásini Eagle Claw Mission,miseydnaðuroyndini hjá amerikanska forsetanumJimmy Carter at bjarga gíslunumá amerikansku sendistovuni í Teheran í Iran. Hann fór ikki við, og tað var hann takksamur við, tí felagar hansara fullu, og aðrir vórðu særdir.

Fyri at heiðra teir gav hann tað lyfti, at hann skuldi gera nakað fyri at heirða teir, sum fullu.

Men ferðina gera teir eisini fyri at koma í metbókina hjá Guinnes. Onnur hava siglt við deksbatum, men teir sigla við einum 15 fóta langum flatbotnaðum báti. Hetta er minsti opni bátur, sum nakar hrevur krossa Atlantshavið við, siga teir.

### Long ferð

Teir fóru 27. juni úr Floridu, sigldu norður eftir fram við amerikansku striondini, til Kandada, Suðurgrønlands, Íslands og Vestmannaoyggjarnar og haðani til Føroya. Ferðin úr Vestmannaoyggjum til Føroya tók tríggjar dagar. Teir høvdu ætlað at silgt teinin í tveir dagar, men teir komu í óðveður. Leygarmorgun komu teir í havsneyð við Tindhólm, leiting varð sett í verk, men avblást næstan beinanvegin, tí teir komu víðari í øllum góðum.

Tá ið teir komu inn á Argjum, stóð av tilvild skálvíkingurin Linjohn Christiansen, sum beyð teimum til heim til sín í Havn, gav teimum at eta, og teir fingu ein langan tiltrongdan blund.

Sunnudagin beyð Elin Heinesen, stjóri teimum heim til sín at vera, til teir fara víðari.

Síðan sunnudagin hevur báturin ligið við bryggju í Vágsbotni, uttan fyri Norðlýsið.

### Nógv vitjandi

Fólk hava valfartað oman at hyggja at bátinum, og tá ið teir báðir amerikanararnir hava verið har, hava teir prátað við fólk.

Tað var rættiligt óveður ein part av ferðini til Føroya, og teir hava sagt, at teir sannførdu seg sjálvar um, at báturin ikki fór at søkka.

- Nei, vit fóru ongantíð runt, siga teir.

Báturin er innan klæddur við flamingo fyri ikki at kunna søkka. Báturin hevur tveir háhangarar.

Menninir hava ikki kunnað rørt seg nógv á ferðini, tí so trongt er umborð. Vi sær høvdu teir bara tað neyðugasta. Yvirlivilsdraktir, mat í einum kassa o.a. Í illveðri bar ikki til at kóka suppu, men annars ótu teir mest grønmeti og dósamat.

### Flaggskrýddur

Báturin hevur fløgg úr nógvum ymiskum londum, Kanada, Grønlandi, Føroyum, Fraklandi, hagar teir skulu. Íslendska flaggið vantaði, og tað var tí, at tað flaggið mistu teir í illveðrinum.

- Men vit hava eitt annað.

Í morgun fekk báturin ein vimpul frá Karna Olsen, formanni í bátafelagnum í Havn.

### Ørskapur ella dirvi

Áðrenn teir báðir menninir kunni sigla víðari úr Føroyum, má báturin takast upp fyri at kanna botnin og gera smávegis umvælingar.

Ralph er prátingarsamur. Hann veit væl, at fólk halda teir vera púra ørar, men hann er sannførdur um, at Gud heldur hondina yvir teimum. Sjólátast teir, so gera teir tað.

- Summi kalla okkum teir seinastu víkingarnar, sigur hann.

So skjótt sum báturin er umvældur, og veðrið sær gott út, fara teir víðari. Kanska leggja teir inn í Hetlandi, annars sigla teir til London, til Fraklands, og málið er Frankfurt í Týsklandi. Nú hevur Ralph hoyrt so nógv um leiklutin hjá Danmark í menningarbeiðinum, og teir hava tí fingið hug at fara til Keypmannahavnar aftaná Frankfurt.

Nógv fólk hava verið niðri á bryggjuni og hugt bátinum. Garvaðir sjómenn siga, at ferðin hjá Ralph og Robert Brown var býtt váðið. Føroysku sjómenninir siga, at teir høvdu nóg illa hættað sær úr Havn til Nólsoyar við hesum bátinum.



*Teir báðir Robert og Ralph Brown greiða frá, at teir umframt at seta met vilja heðra teir, sum doyði ella vórðu særdur í amerikanskku innrásini í Teheran í 1980. Teir siga eisini, at ferð teirra hevur atjóða áhuga*



*Kartni Olsen, formaður í Tórshavnar Bátafelag, handaði í morgun gestunum ein vimpul frá bátafelagnum*



*Báturin er skrýddur við fløggum úr fleiri londum*